# SANDI ÁHUGA RENNUNI




*Teigarnir í ymsu litunum eru loyvini latin eru oljufeløgum í vanligu útbjóðingunum. Økini, sum eru millum markið og stiplaðu linjuna, eru fevnd av nýggja "open door" skipanini, har oljufeløg kunnu søkja og fáa loyvi tillutað - eitt ávíst øki - uttan at tað fyrst skal vera ein útbjóðingarrunda*

*Kort Jarðfeingi*

## Marknaðarførdu undirgrund í London

Í døgunum frá 23. til 26. november vórðu føroyingar á altjóða framsýning og ráðstevnu í Londum við tí heldur óvanliga endamálinum: at "selja" ella marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting. Talan var um Petex oljumessuna, har umboð fyri myndugleikar, oljufeløg, undirvísingarstovnar, seismikkfeløg oo. hittast fyri at marknaðarføra øki til oljuleiting ymsa staðni kring heimin.

Jarðfeingi umboðaði Føroyar við egnum bási og var luttøkan væleydnað. Føroyski básurin var væl vitjaður av umboðum fyri oljufeløg, ymsum veitarum av tænastum/data og hægri útbúgvingarstovnum. Eisini nýttu føroysku umboðini møguleikan at tosa við umboð fyri onnur lond, sum marknaðarførdu síni øki, eitt nú Nova Scotia, Vestur Australia, Grønland, Írland oo.

Føroyar høvdu við sær eina spildurnýggja vøru at marknaðarføra, nevniliga "Open door" útbjóðingina, sum er nýggjur og lættari/skjótari møguleiki fyri at fáa leitiloyvi á landgrunninum. Eitt oljufelag kann fáa loyvi at leita í einum ávísum øki, uttan at hetta skal vera partur av eini stórari útbjóðing. Hetta er rættiliga vanligt í øðrum londum.

Umframt at lond marknaðarføra seg sum nýggjar oljuprovinsir, so fevnir stórur partur av Petex um ymsar veitarar, sum selja tænastur, ið eru relevantar í leititíðarskeiðnum, tvs seismikk, aðra data innsavnan, analysu av data og/ella prøvum osf. Harafturat er eitt øki á ráðstevnuni, har oljufeløg leita eftir nýggjum starvsfólkum. At Petex fevnir so breitt ger, at ein stovnur sum Jarðfeingi hevur møguleika at fáa nógv burturúr.



*Heri Ziska, serfrøðingur hjá Jarðfeingi heldur tað fer at loysa seg at halda fram við at marknaðarføra føroyska landgrunnin*

okkara landgrunni í framtíðini?

– Oljufeløg hava seinastu árini víst Hetlandsrennuni ein støðugt vaksandi áhuga, og sást hetta aftur millum tey, sum vitjaðu básin. Nakrir av fyrispurningunum vóru eisini sera ítøkiligir, meðan aðrir vóru meira leitandi.

### Menna oljuleitingina

– Hvar heldur tú sjálvur vit skulu leggja størstan dentin á í okkara marknaðarføring av leiting á landgrunninum nú eftir framsýningina í London?

– Hetta er ein sera breiður spurningur, men eitt stutt svar er, at Jarðfeingi kemur framhaldandi at menna oljuleiting á føroyska landgrunninum við m.a. at menna nýggjar leitimyndlar, fáa í lag gransking, ið kann stimbra undir leiting, seta fokus á øki, ið ikki eru í fokus osf.

Uppá fyrispurning hvussu hann sjálvur heldur framtíðina vera fyri leiting á landgrunninum sigur Heri Ziska, at oljuleiting í Hetlandsrennuni sum heild og harvið eisini á føroyska landgrunninum hevur verið í støðugum vøkstri seinastu 5-7 árini, og tað eru ábendingar um, at hesin vøkstur fer at standa við komandi árini.

– Á Jarðfeingi hava vit alla tíðina arbeitt fram móti at fáa meir og betri leiting, og kemur tað ikki at broytast. Vit royna tó alla tíðina at eftirmeta, hvussu vit royna at røkka málinum, og eitt ítøkiligt úrslit av hesum er tað, at vit nú hava verið og marknaðarført einstøk leitimið. Nær vit aftur justera ella broyta mátan, vit arbeiða uppá, veldst um úrslit av framhaldandi eftirmetingum.

*jan@sosialurin.fo*